LØGMÁLARÁÐIÐ

Kommunufelagið

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

ALMENNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Semjuskjal um felags tilgongd til gagn fyri børn og ung

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Løgmálaráðið og Kommunufelagið eru samd í at virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina tænastur, sum verða veittar børnum og ungum til tess, at tey kunnu hava viðburð og trivnað.

Málið er at laga niður forðingar, sum kunnu verða millum ymsu skipanirnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur til børn og ung. Partarnir í semjuskjalinum eru samdir í, at økt samstarv er neyðugt fyri at tryggja, at børn og ung kunnu verða sett fremst í tænastuveitingunum, og fyri at vit hava eitt barnavinarligt samfelag. Fyribyrgjandi átøk og heilsufremandi tiltøk virka við til at røkka málinum.

Farið verður undir eina verkætlan, við støði í eini verkætlanarlýsing, sum partarnir hava góðkent. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur leiðsluna av verkætlanini, og øll virkisøkini luttaka virkið í arbeiðinum og við øllum neyðugum upplýsingum.

Málið er at seta barnið í fremstu røð, tá ið tænastur verða veittar frá ymsu pørtunum og at virka í felag fyri, at tænasturnar verða sameindar og samskipaðar, fyri at røkka einum so góðum úrsliti sum møguligt.

*Visiónin er, at Føroyar skulu verða tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Øll børn og ung skulu hava tryggar og góðar karmar, sum tey mennast og mentast í, til tess at tey blíva heil menniskju, sum kunnu virka í einum rúmligum demokratiskum samfelagi, har øll trívast.*

*Børn- og ung, sum hava tørv á hjálp og stuðli fyri at hava viðburð, skulu fáa tær neyðugu veitingarnar og tænasturnar so tíðliga og munadygt sum møguligt. Ein skilagóð fyriskipan skal tryggja sameining og samskipan av fjølbroyttum tænastum, sum ymsir geirar og stovnar veita, soleiðis at hesir samvirka til tess at veita eina so góða tænastu sum møguligt.*

Tinganes, 28. mars 2023

Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður
Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður
Løgmálaráðið

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna
Almanna- og mentamálaráðið

Torbjørn Jacobsen, formaður
Kommunufelagið

Margit Stórá, landsstýriskvinna
Heilsumálaráðið

Heðin Mortensen, næstformaður
Kommunufelagið